# Kjak



**Helgi Abrahamsen**
*løgtingsmaður*

## Misskilt nationalisma

Í eini roynd at skapa eina fíggindamynd av dønum, skrivar Høgni Hoydal, nú um dagarnar, eina blaðgrein um hugtakið "Misskilt nationalisma".

Ikki heilt óvæntað kemur hann til ta niðurstøðu, at Danmark umboðar valdsharrarnar, sum hevja seg yvir allar føroyingar og halda seg kunna avgera okkara framtíðar lagnu, meðan Høgni sjálvur umboðar tað føroyska fólkið.

Hetta er tann vanliga myndin, sum hann roynir at mála, men myndin er skeiv.

Nationalistisku valdsharrarnir eru ikki danskir politikarar, tí teir hava fyri nógvum árum síðani gjørt púra greitt, at tann ríkisrættarliga avgerðin liggur í Føroyum – og bara her. Nei nationalistiski fíggindin hjá Føroya fólki eru Høgni Hoydal og hansara viðhaldsfólk, sum fyri ein og hvønn prís vilja hava alt valdið í landinum, og fyri hetta valdið, skal vanliga fólkið gjalda í dýrum dómum.

Hesir valdsharrarnir sluppu fyri 10 árum síðani at velja loysing, men tá tað gjørdist teimum greitt, hvat hetta fór at kosta, slitu teir samráðingarnar.

Síðani hevur verið arbeitt við hond og fót, fyri at smoyggja loysingina inn aðrar vegir. Ikki minst, nú stjórnarskipanaruppskotið verður viðgjørt, roynir Høgni av øllum alvi at gera loysingina til part av hesum, og tað verður millum annað gjørt við at mála fíggindamyndir av dønum.

Men hetta er ein skeiv mynd, tí tann kúgandi, nationalistiski valdsharrin býr í Føroyum !



**Høgni Hoydal**

## Misskilta nationalisman í Føroyum

Onkur spunasmiðjur hjá Edmundi Joensen hevur upp í saman skírt føroyskt sjálvstýrisfólk at vera fongd við "misskiltari natsjonalismu". Men í veruleikanum umboða Edmund Joensen, Kaj Leo Johannesen og onnur, ið føra slíkt fram, eina misskilta og avoldaða danska nasjonalismu í Føroyum.

Í sambandi við stjórnarskipanarmálið og hvalaveiðimálið hava vit enna einaferð upplivað, at ein evarska lítil minniluti í Føroyum, gongur beint ímóti rættindum hjá føroyska fólkinum og semjum í føroyska samfelagnum. At fólkaflokkurin og javnaðarflokkurin lata tað um seg ganga, hóast teir látast at vera ónøgdir, er eisini bert ein endurtøka av søguni. Danska stjórnin stuðlar so hesum evarska lítla minnilutanum í Føroyum – og tað hava vit sæð so oftani.

Tað er beint ímóti fólkaræðisligum mannagongdum og er reinur valdspolitikkur – fjaldur sum løgfrøði.

Tað løgna er kortini, at Edmund Joensen, Kaj Leo Johannesen og onnur ikki fíra fyri at skíra føroyska sjálvstýrisstríðið fyri »misskilta nasjonalismu«.

Men nasjonalisma í tí negativa týdninginum, hon hevur havt í heimssøguni, snýr seg um, at ein tjóð, ein mentan, eitt fólk heldur seg vera hevjað yvir onnur og kann gera av lagnuna hjá øðrum fólkum.

At fólk ikki eru javnsett, men at summi eri betri enn onnur og hava onkran søguligan ella himingivnan rætt at siga øðrum, hvat tey kunnu og skulu ímóti teirra vilja.

Nú er so spurningurin: Hvar hevur nøkur føroysk nasjonalisma verið galdandi nú ella í søguni?

– Ætla vit at siga Danmark og danska fólkinum, hvørji rættindi tey skulu hava?

– Nokta vit fyri, at danska fólkið hevur evsta valdið í Danmark?

– Halda vit at føroyska málið skal hava framíhjárætt í Danmark, soleiðis at danir skulu læra heimin at kenna á føroyskum og at danskt er eitt verri mál enn føroyskt?

– Er føroyskt mál, og at tað er tjóðarmál í Føroyum ein hóttan móti, at danska málið kann mennast í heiminum?

– Hava vit noktað dønum rættindi teirra?

– Hava vit sagt, at danir kunnu ikki gera sína egnu stjórnarskipan ella gera avtalur við onnur lond?

– Standa vit við einari lóg, sum danir ongantíð hava samtykt og krevja, at teir skulu halda seg til hana, tá teir velja sína framtíðarleið?

Høvdu vit gjørt tað, so kundu vit av sonnum verið rópt »nasjonalistar« í negativari merking.

Men eg kenni í veruleikanum onkra skipan, sum uppførir seg júst soleiðis nasjonalistiskt mótvegis eini aðrari tjóð. Og eg kenni nógv fólk sum stuðla hesum og ikki fíra fyri at rópa tey, sum bara krevja at verða javnsett við onnur, fyri »nasjonalistar«.



**Súsanna Sørensen**
*deildarstjóri, VisitFaroeIslands*

## Millum glasur og myrkan himmal

Eru Føroyar gráar, keðiligar og brúnar? Ella eru tær frískar, bláar og grønar? Hetta er ein týdningarmikil spurningur at seta sær, tá vit skulu gera eina marknaðarføringsstrategi fyri Føroyar. Í hansara kronikki 15. juni hevur journalisturin Fróði H. Knudsen eina greiða fatan av, hvussu vit skulu marknaðarføra Føroyar. Í hansara hugaheimi skulu vit *bara* vísa grøna grasið, sprottin trø og blómur og bláa himmalin. Hetta nýtist ikki at verða einasti og rættasti mátin.

Fyri stuttum vitjaði Laurie S. Fulton, amerikonsk sendikvinna í Danmark, Føroyar. Møguleikin at uppliva allar árstíðirnar sama dag stendur eftir sum hennara sterkasta minni úr Føroyum. Sama boðskap høvdu amerikonsku myndafólkini, sum herfyri vóru í Føroyum í sambandi við eina bók um Guðrun&Guðrun. Hesar útsagnir eru kjarnan í einari marknaðarføringsætlan av Føroyum sum ferðafólkaland: Nevnliga at Føroyar eru eitt eldorado av mótsetningum.

Útlendsk ferðafólk verða drigin av skiftandi ljósinum, sum sermerkir Føroyar. Av mótsetningunum millum Føroyar og umheimin, millum dynamiska høvuðsstaðin Tórshavn og friðarligu, smáu bygdirnar, millum modernaða lívsstílin við sushi, cocktails og caffé latté til seiðaberg, seyðahald og føroyskan dans ella millum sól og summar á Leynasandi og kensluna av at vera eitt við náttúruna niðri við sjóvarmálan við bergtakandi brimi.

Hesar mótsetningar gera okkum serstøk. Og júst hetta skulu vit selja. Leggja vit okkum eftir bara at selja glansbílætið, hvørvur møguleikin at marknaðarføra mótsetningsfullu Føroyar. Tí eiga vit at seta spurning við grundgevingarnar hjá Fróða H. Knudsen. Hann vísir til heimasíðunar hjá Hetlandi og Akureyri sum fyrimyndir. Heldur enn at gera tað, sum hini gera, eiga vit at finna okkara egnu rás. Hetta er eisini í tráð við frágreiðingina hjá Simon Anholt um kappingarsamleika Føroya, har hann slær fast, at *"the biggest challenge in tourism promotion is standing out from the crowd."*

Okkara málbólkur eru fólk, sum koma til Føroyar fyri at uppliva okkara dragandi náttúru og mentan, samstundis sum tey hava møguleikan at royna tilboðini í okkara modernaða høvuðsstaði . Umframt verandi málbólk, arbeiða vit miðvíst við at víðka um málbólkin.

Í síni viðgerð av marknaðarføringini av Føroyum sigur Fróði H. Knudsen, at vit selja tað, vit ikki hava. Síðan finnur hann nøkur tekstbrot í fyrsta partinum av heimasíðuni, sum undirbyggja hansara sjónarmið. Vit eru samd um, at hesi tekstbrot skulu betrast og vit fáa nøkur fín dømi uppá, hvussu tað kann gerast.

Um Fróði H. Knudsen hevði farið víðari inn á heimasíðuna (www.visitfaroeislands.com), hevði hann funnið tekstir, sum fortelja um alt tað, vit eru. Tekstir um list, mentan, fulglalív, arkitektur, Tinganes osfr. Umframt hesar lokkandi tekstir kann tann vitjandi siggja, hoyra og uppliva Føroyar gjøgnum myndir, ljóð og filmar. Heimasíðan skal verða staðið, har útlendsk ferðafólk fá allar neyðugar upplýsingar um fjølbroyttu upplivingarnar, gistingarmøguleikarnar og matstovurnar í Føroyum og kunnu koma í samband við útbjóðararnar . Vit hava lagt okkum eftir, at litirnir á síðuni og á myndunum skulu vera klárir, sterkir og sevjumiklir og ikki myrkir, brúnir og avsvidnir, sum lesarin av kronikkini í Dimmalætting annars fær fatan av.

At enda vil eg takka Fróða H. Knudsen fyri eina áhugaverda kronikk. Tað er gott og neyðugt at fáa eitt íkast til kjakið um marknaðarføringina av Føroyum sum ferðafólkaland. Áhaldandi kjakið skal tryggja, at vit, sum varða av ferðavinnuni, eru tilvitað um hvønn boðskap, vit senda.